

## Sethúsini Suðurrás 10, Tórshavn, til sølu





Húsini eru í 3 hæddum. Kjallari og miðhædd á 84 kvm og loft á 75 kvm. Grundøkið er 400 kvm. Byggiár 1974.

Í kjallararnum er íbúð við køki, stovu, kamari og wc. Eisini er vaskirúm, hjallur, fýrrúm og kjallararúm við trappuuppgongd.

Í miðhæddini er køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og durur.

Á loftinum er stova, 2 kømur, wc og lítil gongd.

Húsini og havin eru vælhildin. Húsini standa í friðarligum barnavinarligum umhvørvi og stutt er oman í býin.

Áhugað ringið **223369**

## ISM-Góðskuleiðari

Eitt parttíðarstarv sum ISM-Góðskuleiðari hjá P/F THOR í Hósvík er leyst at søkja.

Rætti umsøkjarin hevur gott innlit í ISM og góðskuskipanir yvirhøvur og hevur royndir sum yvirmaður á skipi.

Hetta starv kann vera hóskandi til ein »ungan« pensjóneraðan skipara.

**Førleikakrøv:**
- Skipsføraraprógv
- Hevur sìglt undir ISM-skipan
- Er førur fyri at málbera seg væl, bæði skrivligt og munnligt
- Er røkin
- Er positivur
- Dugir at nýta teldu
- Tosar flótandi enskt
- Dugir væl at samarbeiða við fólkasløg

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 11. august 2003.

*P/F THOR er eitt frálandsvinnu tænastu felag. Vit eiga ella reka 8 skip, av hesum eru 6 í arbeiði innan oljuvinnu ídnað sum chase-, guard- og supportskip.*

*Skrivstova okkara og skipið Tórsvík eru ISM og ISO 9002 skrásett.*

*Vit hava arbeitt innan frálandsvinnu síðani 1997, og hava veitt tænastur til meginpartin av teimum størstu seismisku feløgunum. Ein av okkara fyrimunum er, at vit eru ISO og ISM góðkend. Tí miða vit ímóti at fáa øll okkara skip ISO og ISM skrásett, og at skipanirnar støðugt verða dagførdar og betraðar.*

## Føroya Koyriskúli

**Jekaragøta 10 · 100 Tórshavn**

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar 30. juli 2003 kl. 17.30

Motorsúkklukoyrikort byrjar kl. 19.30

**Tekning:** Stanley Olsen tel 21 10 99
John Christiansen tel 21 47 75
t-post: stanley@post.olivant.fo

Sosialurin 341800

## P/f Jógvan Weihe

*Heil- og smásøla*

### TOBIS

Nýfiskaður Tobis 15-20 cm á goymslu í komandi viku.

**Ordrar kunnu bíleggjast nú á tel 21 38 97**

*Staravegur 15 · Tel. 31 38 97 · Fartel. 21 38 97 · Fax 31 38 83*
*Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo*
*heimasíða: www.jogvan-weihe.fo*

## Kunngerð um ferðslu á Ólavsøku 2003

Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag 28. og 29. juli frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 8.00 verða hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er **ikki** loyvd, eftir **Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í N. Finsensgøtu frá Vaglinum og niðan til AUTO, ella í Mylnugøtu.**
Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er **ikki** loyvd tvørtur um **Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún,** undantikin eru hýruvognar, Buss- og Bygdaleiðir.
Um hetta vegamót gongur støðugt nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

**Í Niels Winthersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku** er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

Meðan kappróðurin fer fram ólavsøkuaftan, er **Eystara Bryggja stongd** fyri vanligari bilferðslu **frá Kongarbrúnni til Jónas Broncksgøtu** frá kl. 14.00 til kl. 19.00.

Á parkeringsøkinum á Bursatanga er ikki loyvt at parkera frá 27. juli kl. 20.00 til 29. juli kl. 9.00.

**Ólavsøkudag,** frá kl. 10.00 til kl. 14.00, verður øll ferðsla um **Vaglið** órógvað og ikki kann roknast við, at koyrandi verður eftir Mylnugøtu, Áarvegnum um Vaglið v.m. vegna skrúðgongu úr Føroya Løgtingi í Dómkirkjuna og aftur.

Tórshavn, hin 23. juli 2003

**Politiið**



## LUTASEÐIL

Fæst á Statoilstøðunum kring landið



| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Toyota Corolla 1.6 Terra Sedan (Frá Reyni Service) | virði | 199.600 kr. |
| 2. | Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm t/r við uppihaldi í eina viku í Danland ella DanCenter (Frá Smyril Line) | virði | 19.995 kr. |
| 3. | Olja frá Statoil | virði | 10.000 kr. |
| 4. | Gávukort frá Thomas Dam á Hálsi | virði | 10.000 kr. |
| 5. | Apex ferðaseðil fyri 2 til DK t/r (Frá Smyril Line) | virði | 6.266 kr. |
| 6. | Gávukort frá LM handlinum | virði | 5.000 kr. |
| 7. | Gávukort frá Statoil | virði | 5.000 kr. |
| 8. | Gávukort frá Radiohandlinum v/ E. & P. Persson | virði | 5.000 kr. |
| 9. | Føroyskt krov | virði | 1.000 kr. |

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 4. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 5. og 6. august 2003.
Eisini kann ringjast til Kristiannu tlf. 227 717 · 312 380 · 319 017

Hestprent 314 555

STATOIL

**Tórshavnar Ítróttarráð 2003** **20 kr.**

## Servitrisa søkist

Søkt verður eftir servitrisu at byrja 1. august. Skiftandi arbeiðstíðir.

Umsøkjarin má vera fyltur 18 ár.

Servitrisur við royndum hava fyrimun.

Nærri fæst at vita við at ringja á tel 448690 og spyrja eftir John

**JOHN's RESTAURANT**
Saltangará - Fax/Tlf. 448690

## Marianna Clausen

**signerar**
bókina um føroysku kvæðaløgini
í H.N. Jacobsens Bókahandli
leygardagin 26. juli millum kl. 11.00 og 12.00.

H. N. Jacobsens Bókahandil

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 28. juli til 15. august, báðir dagarnir íroknaðir.

**LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR**
Postboks 1339 · FO-110 Tórshavn

## Summarfrí

Eykalutagoymslan er stongd vegna summarfrí til 18. august 2003.

FIAT BMW

**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
Tel. 317300 ella 217300

## 10-mannafar og 19 tonsari til sølu

- Nýbygt 10-mannafar til sølu fyri 45.000 kr.
- 19 tonsari Hamranes uttan fiskiloyvi til sølu.

**Tlf. 44 80 73**

## Summarfrí

Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí frá mánadegnum 28. juli til mánadagin 18. august 2003.

**Sørvágs kommuna**
tlf. 332004 · Fax 332952
t-postur: sorvag@sorvag.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar
Tíðindi Viðmerkingar

## Øll hava eina góða síðu – pop.fo hevur 100